## SF vil loyva bróstum í svimjihallunum

Sosialistiski Fólkaflokkurin í Keypmannahavnar kommunu ætlar at leggja fram uppskot um, at tað verður loyvt kvinnum at svimja toppleysar í svimjihallunum í danska høvuðsstaðnum. Uppskotið kemur fram eftir at nakrar ungar kvinnur fyrr í mánaðinum høvdu eina happening í DGI-býnum, har tær svumu toppleysar. Upprunin var eitt tiltak hjá einari svenskari kvinnurørslu, sum nevnir seg „Bara Bröst". Men mótvegis teimum svensku kvinnunum, so sluppu tær donsku at gjøgnumføra sítt tiltak.



# Søgulig slupp fór til botns

**Tollaksmessumorgun sakk Høganes við bryggjuna í Runavík**

Søguliga sluppun, Høganes, fór til botns í illveðrinum tollaksmessumorgum, har hon lá við bryggju í Runavík.

Tað var mitt um fyrrapartin í tollaksmessumorgun, at løgreglan fekk boðini um, at aldargamla sluppin hevði nógva slagsíðu og á miðdegi stóð hon á botni.

Sløkkiliðið varð boðsent og teir hava roynt at pumpa sjógvin úr henni og seinnapartin kom hon aftur á rættkjøl.

Enn er óvist, hví hon sakk, men fyribils metingarnar siga, at pumpurnar umborð eru fyrigingnar og av tí sama er hon so sokkin, tí hon lekur so mikið illa.

Høganesi hevur ligið við bryggju í Runavík og hevur verið brúkt til mentanarligt virksemi av ymsum slagi, eitt nú smærri konsertir, listaframsýningar, kafé og annað líknandi.

Í hesum sambandi hevur hon verður eitt rættiligt ferðamál hjá útlendingum, sum hava vitjað har um leiðir.

Men nú er so óvist nær tiltak verður umborð á Høganesi aftur. Annars hevur verið tosað nógv um at draga hana upp á turt at umvæla hana – og hetta er kanska eitt gott høvi til tað.

Høganes varð smíðað í Rye í Skotlandi í 1881.

**-áki-**



*Gamla sluppin Høganes fór til botns tollaksmessudag, men tað eydnaðist at lensa hana aftur. Myndina tók Vilmund Jacobsen*

## Vindur elvdi til stúran

**Løgregla og bjargingarlið hava fingið nógvar fráboðanir um smærri skaðar í tí nógva vindinum, men tað er nógv, sum bendir á, at byggifyritøkur tryggja seg ikki nóg væl**

Tað hevur verið heilt nógvur vindur á jólum og bjargingarlið og sløkkilið, hava fingið nógvar fráboðanir í tí sambandi.

Nógvur vindur var leygarnáttina og Tollaksmessudag, heilt upp í 60 metrar um sekundið onkustaðni og aftur í gjárkvøldið var heilt fitt av vindi.

Men skaðar hava verið fáir og smáir, mest hevur tað verið takplátur, sum hava rivið, men í flestu førum er eydnast at byrgja fyri, at skaði hevur staðist av.

Hinvegin eru tað mong, sum hava boðað løgregluni frá, tí tey hava stúrt fyri, at ymist, sum liggur leyst, skuldi gera skaða.

Og í hesum sambandi er tað nógv, sum bendir á, at tað hevur knípt hjá byggifyritøkum og arbeiðsplássum annars, at tryggja arbeiðsplássini, áðrenn tey hava pakkað saman til jóla.

Nógvar av fráboðanum til løgregluna snúgva seg nevniliga um, at byggitilfar og útgerð og amboð, sum verða brúkt í arbeiðnum, hava ligið leyst og sløðist, uttan at verða tryggjað fyri stormi og er sostatt í vanda fyri at fara í luftina og gera skaða.

Løgreglan hevur fingið heilt nógvar fráboðanir av hesum slagi um ein stóran part í landinum.

Yvirhøvur hevur løgreglan so sent boðini víðari til sløkkilið og bjargingarfeløg, sum so eru farin á staðið at tryggjað arbeiðsplássini.

Og tað er í allarflestu førum eydnast, áðrenn skaði hevur staðist av.

**-áki-**



*FK í Hoyvík fekk óbodnar gesti jólaaftan, men har er tjóvariávaring, so tað kom lítið burturúr*

# Jólainnbrot í Keypssamtøkuni

**Innbrotstjóvar halda ikki jól og sjálvan jólaaftan brutu teir ikki í FK í Hoyvík**

Yvirhøvur hevur verið stak friðarligt hjá løgregluni á jólum, men tað eru kortini ikki øll,sum halda jól.

Beint eftir midnátt sjálva jólaaftan varð brotið inn í Keypssamtøkuna í Hoyvík. Men har er tjóvariávaring og hann fór ígongd og tí varð løgreglan skjót á staðið.

Óvist er um innbrotstjóvarnir fingu nakað við sær.

Hon tók tríggjar mans, sum hon heldur kunnu hava samband við málið.

# Nógv smáttarí hjá løgregluni

**Tað hevur nógv fólk verið í býnum í nátt, men tað hevur ikki elvt til álvarligar trupulleikar**

Løgreglan hevur havt tað friðarligt í nátt.

Vakthavandi á støðini sigur, at tað hevur verið nógv fólk í býnum og tá er altíð brúk fyri løgregluni til mangt og hvat.

Tað hevur tað eisini verið á jólum, tí løgreglan er ofta boðsend til trupulleikar av alla handa slagi.

Men tað hevur havt lítið upp á seg, tí talan hevur mest verið um at vekja avdotnar menn og at skilja kamphanar sundur, ell at taka sær av fullum monnum, sum eru blivnir ólátaðir, ella sum eru dotnir.

Um vikuskiftið læt ein maður í Havn onkrar frustratiónir ganga útyvir eina fløsku, sum hann knústi í vegin. Men tað er ikki lov og sostatt fær hann bót fyri tað, so tað bleiv dýrt.

Og so var tað tann obligatoriska hendingin, at onkur følir trongd til at loysa sær buksurnar og at rena sín bera afturpart upp undir nasarnar á løgregreglufólki. Tað hendi aftur í havn í nátt, men løgreglan dugir ikki at síggja tað stuttliga í hesum, so tað fær viðkomandi eisini bót fyri.

Um sjálva høgtíðina var annars sera friðarligt.

Men 2. jólakvøld er gamalt veitslukvøld og tað var tað eisini hesuferð. Og í tí sambandinum hevur løgreglan havt nokk at gera, men talan hevur framvegis bara verið um smáttarí og sum ein reyður tráður ígjøgnum alt, sum løgreglan hevur verið tilkallað til, er fyllskapur.

Talan er antin um fólk, sum eru dottin, ella um fólk, sum elva til ófrið og fara til hendurs. Í onkrum førum hava tveir mans meldað hvønn annan.

Onkur hevur fingið frammaná og onkur er sligin í høvdið við fløsku. Onkur er dottin niður ígjøgnum einar trappu og annað mangt, sum løgreglan hevur verið upp í í.

Í einum føri varð ein bilførari meldaður, tí mett varð, at hann koyrdi heldur ótrygt. Løgreglan tók hann, men hann var edrúvur. Hann skuldi til ein bát, men hevði góða tíð og tók tað tískil so mikið róligt í bilinum, at tey hildu hann vera skít.

Hinvegin var ein maður tikin fyri at koyra við kenning.

**-áki-**